## Hvítusunna við teim hvítu klæðunum

Høgtíð til minnis um, at Heilagi andin kom yvir ápostlarnar (Ápostlasøgan 2, 1-13),

Navnið hvítusunna kemur av, at í fornkirkjuni var hetta dópstíðin fram um aðrar, og av teimum hvítu klæðunum, tey, sum doypt vórðu, vóru í.

Navnið "hvítusunna" vinnur sær rætt í gomlu ensku kirkjuni, og haðani kemur tað til Noregs, Íslands og Føroyar. Men tað navnið, sum annars vann fram í flestu europeisku londunum var orðið, sum til dømis á donskum er "pinse". Og tað kemur av grikska orðinum "pentekoste", ið merkir 50. dagurin eftir páskir.

Høgtíðin, sum ápostlarnir komu saman á, var annars gomul jødisk takkarveitsla fyri hveitiskurðin. Men í kristnu kirkjuni fær høgtíðin so ein annan dám og týdning.

Tað er annars ikki so langt síðani, at tú í Føroyum kundi hoyra fólk ynskja "gleðiliga pinsafest", men tað man ikki hoyrast longur.

Føroyska navnið á høgtíðini hevur so altíð verið hvítusunna.

*(Kelda: Dagar og nøvn í álmanakkanum eftir Axel Tórgarð)*

## Halgi Andi, kom við megi

Lag: Vinir Guds á ongum sinni
(Bf. 83/Danmark. 164,165)

*Halgi Andi, kom við megi*
*eins og hvítusunnudag;*
*hann sum veitir sanna gleði,*
*sálir syngja lovsongslag.*

*Halgi Andi, lat meg kenna*
*hvat Guds vilji er í verð;*
*hann í trúnni vil meg menna,*
*altíð fremja kærleiksgerð.*

*Halgi Andi, við mær verði*
*her í dag og alla tíð;*
*so at alt á fold eg geri*
*lær meg stríða trúar stríð.*

*Halgi Andi, kom í náði*
*til hvønn syndara í verð;*
*hann í hjarta mínum ráði*
*her við síni sáttargerð.*

(Kjartan Stakksund, Eiði)



# Tey fyrstu kristnu

*Eftir Kjartan Stakksund, Eiði*

*"Og tey hildu fast saman um læru ápostlanna og samfelagið og breyðbrótingina og bønirnar".* (Ápostlasøgan 2, 42)

Hetta var aftaná ta fyrstu hvítusunnuna, tá ápostlarnir vóru samankomnir á einum staði í Jerúsalem, at Heilagur Andi kom niður yvir teir.

Hetta var tað, ið Jesus segði við lærusveinar sínar, áðrenn hann varð tikin frá teimum upp til himmals, - at hann skuldi senda talsmannin, Heilaga Andan til jarðar. Tað var júst tað ið hendi á hvítusunnu.

Hvørja ávirkan hevur hetta so havt fyri mannaættina, síðani hina fyrstu hvítusunnuna? Jú, menniskju hava verið gripin av Jesusi, soleiðis at hesin gleðiboðskapur eisini er náddur til okkara oyggjar úti í Atlantshavinum. Tað vóru menniskju, sum vóru kallinum lýðin, at fara við gleðiboðskapinum eisini til okkara landsmenn.

Tað var júst Heilagi Andin ið gav lærusveinunum hesa kraft at fara í lýdni út at boða gleðiboðskapin, eisini á okkara oyggjum, sum eru av heidnari rót. Hetta hevur so gjørt tað, at vit eisini hoyrdu boðskapin um Jesus og hansara undurfulla náði og kærleika móti menniskjum, sum eru fallin í synd vegna syndafallið á sinni, tá mannaættin var rikin úr Edens aldingarði.

Hvussu er statt í dag? Hetta er tann brennandi spurningurin, - eru vit líka íðin sum tey fyrstu kristnu, ella eru vit líkasæl?!

Eg lati henda spurningin standa opnan.

Gud gevi okkum eina gleðiliga hvítusunnu í Jesu navni. Síðani vil eg enda við einum hvítusunnusálmi, sum eg havi yrkt til hvítusunnuna 2007.



Kollfirðingar bjóða til stevnu í skúlahøllini um høgtíðina

# Stevna til skúlan í Kollafirði

**Í gjárkvøldið byrjaði tann stóra hvítusunnustevnan, sum verður hildin í skúlahøllini í Kollafirði**

**Møtir:** Tað er eitt stórt tal av talarum og sangkreftum, sum fara at seta hvørjum øðrum stevnu um høgtíðina.

Møtirøðin byrjaði í gjárkvøldið við einum bønarmøti í missiónshúsinum. Síðani verður hildið á í skúlahøllini.

Her halda møtini fram í kvøld, leygarkvøldið og hvítusunnukvøld kl. 20. Seinasta møtið verður 2. hvítusunnukvøld kl. 18.

Við møtini luttaka talarar, sangbólkar, solistar og kór við sangi og vitnisburðum.

Eftir hvørt møti í skúlanum verður skipað fyri eftirmøti í missiónshúsinum við nógvum sangi og vitnisburði. Innsavnað verður somuleiðis á møtunum.

Á stevnuni verður haraftrat møguleiki at fáa forbøn og samtalu um andaligar spurningar.

Sosialurin